# Super Sonic við hørðum rocki

**Bólkurin Super Sonic, har føroyski Edmund Jacobsen er sangari og sangskrivari, gevur fyrst í komandi ári fløgu út í Føroyum. Fløgan kallast »Onetwothreefour«**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Super Sonic er frá vinstru: Simon Fontana (guitar), Edmund Jacobsen (sang), Matthew Anyanwu (trummur) og Bent Venø (bass)*
*Mynd: Paul van Zijl*

Super Sonic er mannað við føroyinginum Edmundi Jacobsen, ið saman við trimum donskum tónleikarum hevur skrivað og innspælt seks sangir til fløguna. Talan er um harðan rock, ið eisini hevur dynamik og melodi.

– Hetta er eitt sera spennandi projekt. Síðani vit vandu fyrstu ferð í februar 2004, hevur arbeiðið gingi við fúkandi ferð. Og nýggja fløgan er eitt slag av varða fyri bólkin. Vit hava nógvar ætlanir fyri framtíðina, sigur Edmund Jacobsen.

Edmund Jacobsen er úr Runavík og byrjaði av álvara at spæla tónleik miðskeiðis í áttatiárunum. Hann hevur millum annað verið við í bólkunum Skorum, Kontrast og Rockmen. Tey flestu munna tó kenna Edmund best sum sangara í Chase, ið gav fløgur út í 1992 og 2001.

– Vit fara at spæla dúgliga í 2005 og ætla eisini at koma ein túr til Føroyar. Vónandi fær fløgan undirtøku millum føroyskar rock-elskarar.

### Nýggjur bólkur

Super Sonic var stovnaður av Edmundi og guitaristinum Simon Fontana í august 2003, tá ið teir báðir byrjaðu at skriva sangir saman. Ikki fyrrenn í juli 2004 var endaliga manningin funnin, og bólkurin hevur síðani vant dúgliga.

Super Sonic spælir bert egnan tónleik, og hevur fingið íblástur fra bólkum sum t.d. The Cult, Black Sabbath, Alice In Chains og Soundgarden.

Á nýggju fløguni eru hesi løg: Starsucker, Coming Your Way, Right In Front Of You, Soul Center, Get It Off og Cry Of Love.

Bassisturin Bent Venø hevur producerað saman við bólkinum, meðan Jacob Hansen hevur ljóðblandað.

Bólkurin hevur sjálvur staðið fyri upptøkunum, ið eru farnar fram ymsastaðni í Esbjerg.

Tað er Tutl, ið stendur fyri útgávuni í Føroyum.


# Politistur

**Eitt arbeiði við avbjóðingum**

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at menmast.



*Høvuðsuppgávan hjá politinum er:*

- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur íkemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur verða hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet - ikki minst millum børn og ung.

*Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðing fyri rættartrygdini hjá borgaranum.*

**Eitt arbeiði allan sólarringin**

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar. Her er eitt gott samhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikunum hjá einstøku politistunum fyri at rokka felags málum.



Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum - um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er alla tíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

**Løn og útbúgving**

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pension og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum.
Roynartíðin er umleið 3 ár. Aftaná tað fært tú - um tú ert egnaður til politiarbeiði - fast starv sum politistur.

**Menning og karriera**

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum - og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.



**Ynskir tú at vera við?**

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelagnum og við virðing fyri einstøku persónunum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentanarligt støði - og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

*Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:*

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góðu heilsu, vanliga hoyrn og vanliga lítsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

**Meira kunning**

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflyggjað ella sent.

**Føroya Landfúti**
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Postsmoga 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 1448 fax. 35 1449
Heimasíða: www.politi.fo

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. Politistar skulu setast í apríl, august og desember 2005.
Umsóknarfreistin til hesa upptøkuroyndina er 1. januar 2005.


# Methøgt ferðafólkatal

Seinastu hagtølini frá Flogvøllinum staðfesta, at talan aftur í ár verður um methøgt tal av ferðandi.

Til og við 27. desember vóru 165.324 fólk komin og farin flogvøllin. Hóast tað soleiðis enn skulu leggjast fýra ferðadagar afturat hesum tali, so er greitt, at talan verður um met.

Hægsta talið áðrenn hetta var í 2003, tá tilsamans 162.917 fólk ferðaðust um flogvøllin. Roknað verður við, at tá seinastu fýra dagarnir eru farnir aftur um bak, er samlaða talið av ferðafólkum í ár farið upp um tey 166.000.

Tað er fyrst og fremst á Danmarkarrutunum, at talan hevur verið um vøkstur. Her hevur talan verið um eina framgongd upp á 5,2% í mun til 2003. Hinvegin hevur talið av ferðina til og úr Bretlandi verið minkandi.

Hóast økta talið av ferðafólkum, so hevur talan av lendingum og fráferðum verið minni í ár. Samlaða talið komum og fráferðum verður í ár 4.950. Hetta er ein minking upp á 4,6% sammett við 2003.

-jm